# Endiliga fekk Jákup møguleikan



*Jákup Mikkelsen helt tætt, tá hann týskvøldið spældi seinna hálvleik ímóti Viborg*

**Føroyski málverjin íMolde helt tætt, tá teirí Molde mikukvøldið høvdu vitjan av Viborg úr donsku superliguni**

VENJINGARDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen hevur spælt millum lítið og einki á besta liðnum hjá Molde, síðani tað varð farið undir norsku landskappingina. Eftir stuttan summarsteðg fyrireika norsku feløgini seg nú til seinnapartin av kappingarárinum. Fyrsti dysturin í landskappingini verður seinnapartin nú leygardagin, tá Molde á heimavølli skal spæla ímóti Odd Greenland úr Skien. Umframt at vera landskappingardystur, so er dysturin eisini liður í árligu jassvikuni, sum teir halda í Molde í hesum døgum.

Um Jákup Mikkelsen fer at fáa møguleikan leygardagin og í komandi landskappingardystunum man vera rættuliga ivingarsamt. Men mikukvøldið slapp hann framat á besta liðnum í ein hálvleik.

Viborg úr donsku superliguni fyrireikar seg til nýggja kappingarárið, og teir vóru mikukvøldið í Molde, har tað hesa vikuna er veitslurómur.

Eddie Gustafsson vardi Molde málið í 1. hálvleiki, men eftir steðgin fekk Jákup Mikkelsen høvi at standa andlit til andlit við Søren Frederiksen og hinar álopsspælararnar, sum Jákup so ofta spældi ímóti, tá hann og Herfølge vóru í superliguni.

Eftir 1. hálvleik var Viborg á odda 1–0. Málið fingu teir, tá nítjan minuttir vóru farnir. Michael Nonbo stútaði bóltin í kassan eftir innlegg úr høgru.

Í 2. hálvleiki fekk Viborg einki mál, meðan Molde fekk tvey. Tað fyrra varð stútað, tá hálvleikurin bara var tveir minuttir gamal, og tað seinna varð skorað, tá tríggir minuttir vóru eftir. Í báðum førunum var Andre Schei Lindbæk, sum bara spældi við í 2. hálvleiki, málskjútti. Í 2. hálvleiki misnýtti Molde eitt brotsspark.

Norskir fjølmiðlar gera burturúr, at 24 ára gamli Molde málskjúttin ætlar sær at rýma úr felagnum. Sáttmálaskeiðið verður liðugt á nýggjárinum, og álopsspælarin hevur boðað frá, at hann er áhugaður í at spæla aðra staðni. Stóri dreymurin er at sleppa framat í Italia. At áhugin hjá Andre Schei Lindbæk ikki er so stórur at halda fram í Molde hevur havt við sær, at venjarin, Gunde Bengtsson, ikki so ofta ta síðstu tíðina hevur givið honum møguleikan ímillum teir fyrstu ellivu. Eftir at hann skoraði tvey mál ímóti Viborg verður torført at halda honum á beinkinum.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Í Býin

Hafnia Lounge
Livandi tónleikur hvørt vikuskifti
Sunnudag - hósdag
Opið kl. 17.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 17.00-01.00
Servering steðgar kl. 00.30
Hotel Hafnia
Tlf. 31 32 33
Fax 31 52 50

fk Matseðilin
Hósdagin 18. juli: Kálvafrikassé
Fríggjadagin 19. juli: Minuttbúffur
Leygardagin 20. juli: Nakkasteik
Mánadagin 22. juli: Roykt medistarpylsa
Týsdagin 23. juli: Kalkun Gordon Bleu
Mikudagin 24. juli: Karbonadir
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 23,00
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 28,00
Matstovan í Hoyvík

TAXI
Koyr trygt frá og til - ring til BIL
311444 - 313525
Skjót & góð tænasta
SVARAR ALT DØGNIÐ
Bil - Mini Taxi
*Bilstøðin á Farstøðini*
TAXI



Í Býin

Felagið Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
Tey av Kamarinum
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Sjeyskapping týskvøldið 23/7 kl. 19.00
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

NÁTT-BUSSURIN
Tlf. 424254
Bussamir: Tlf. 288254

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 19. juli
• Fimmari
• Opið frá kl. 17.00-20.00
INNIRHALD
Leygardagin 20. juli
• Opið frá kl. 22.00-04.00
Sunnudagin 21. juli
• Opið frá kl. 17.00-22.00

Casablanca Ristorante
Frá kl: 17:00
Bar-B-Cue
Valið sjálvi, og lat Oldera kokk steikja tað.
ET TAÐ TÆR LYSTIR
BERT 98,-

Kaggin
Hóskvøldið spæla
Blues Valentine
Fríggja- og leygarkvøldið spæla
Ólavur Øster Band
Fríggjakvøld ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
www.kaggin.fo

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

PLATFORM

Fríggjakvøldið
*Double up*
*23.00-24.00*
*COCKTAIL*
*spæla til dans*
Leygarkvøldið
*Diskotek*
v/ Martin Kjærbo
BAROK

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
Double Up & ókeypis atgongd frá kl. 21.00 til 22.00
LIVE kvøld
Fríggjakvøldið
DJ Peter Feldhusen
ladies night & Double Up til kl. 23.00 -01.00
Leygarkvøldið
DJ Peter Feldhusen
Club 20 Café
Írskur búffur v/chips, salat & whiskeysós
69,-
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo

Í BÝIN